Skúlatelving - Helgi Dam Ziska

**FM Í SKÚLATELVING 2024**

FM í skúlatelving verður í ár hildið 18.-21. mars. Sum vant verður kappast í tveimum aldursbólkum, har 3.-4. flokkur kappast fyri seg og 5.-8. flokkur fyri seg.

Í hvørjum aldurbólki verða telvaðar tvær undankappingar, har fremstu trý liðini í hvørjari kapping sleppa víðari í eina finalukapping. Undankappingarnar eru býttar á øki, soleiðis at skúlar í Eysturoynni og Norðoyggjum telva í aðrari undankappingini, meðan skúlar í Streymoynni, Vágoynni og sunnanfyri telva í hinari.

Vertir fyri undankappingunum í ár eru Tofta skúli og Skúlin við Løgmannabreyt. Skráin er henda:

- 18. mars á Toftum: undankapping fyri 3.-4. flokkar í norður-eystur økinum
- 19. mars á Toftum: undankapping fyri 5.-8. flokkar í norður-eystur økinum
- 20. mars við Løgmannabreyt: undankapping fyri 3.-4. flokkar í suður-vestur økinum
- 21. mars við Løgmannabreyt: undankapping fyri 5.-8. flokkar í suður-vestur økinum
- Finalukappingarnar verða hildnar eftir páskir. Kunning um tíð og stað kemur seinni.

Allar kappingar byrja kl. 9.30 og eru ætlandi lidnar um kl. 12.30. Matarsteðgur verður hildin miðskeiðis í kappingunum.

Kappingarnar verða skipaðar sum liðkappingar við seks næmingum á hvørjum liði. Reglurnar eru hesar:

- Hvør skúli kann melda upp til seks lið til hvørja kapping. Er pláss fyri tí í kappingini, kann verða loyvt fleiri enn seks liðum.
- Seks næmingar manna hvørt liðið hvørt umfar. Tveir útskiftarar kunnu vera á hvørjum liði.
- Mangla ein ella tveir næmingar í at manna eitt lið, er loyvt at lána næmingar úr eldri ella yngri flokki. Lat meg frætta, um so er.
- Telvað verða fimm umfør við klokku, har næmingarnir hava 10 minuttir í part til talvið.
- Ein leikur er endaligur, tá ið talvfólkið er slept. Er fólkið slept, stendur leikurin við, sama um telvarin hevur trýst á klokkuna ella ikki. Um fólkið ikki er slept, kann leikurin hinvegin takast aftur. Vit telva ikki við, at nortið fólk skal flytast.

Fremstu trý liðini í hvørjari kapping fáa heiðursmerki, og vinnaraliðini í finalukappingunum fáa steyp. Allir luttakarar fáa okkurt gott í matarsteðginum.

Vit síggjast